Løntakarar skulu verjast móti hópuppsagnum

Hans Pauli Støm fer í næstum at leggja fyri tingið lógaruppskot, ið áleggur arbeiðsgevarum ávísar skyldur, áðrenn tað ber til at fremja hópuppsagnir

JOHN JOHANNESSEN

Lógaruppskotið hjá Hans Paula Støm áleggur arbeiðsgevarum skyldu at boða løntakarum og fakfeløgum teirra frá atlaðum hópuppsagnum minst 30 dagar frammanundan, at veruligu uppsagnirnar verða sendar út.

Men hetta er ikki nóg mikið. Samstundis skulu samráðingar takast upp millum partarnar um, hvussu møguliga kann sleppast undan uppsagnunum, ella hvussu tær kunnu avmarkast mest møguligt. Ber hetta ikki til, skal samráðast um, hvussu best kann verjast fyri ringu avleiðingunum av uppsagnunum.

Tá lógaruppskotið nevnir hópuppsagnir, verður meint við støður, har fleiri løntakarar á sama arbeiðsplássi verða sagdir upp í einum. Mett verður, nær talan er um hópuppsagnir, eftir talinum av uppsagnum í mun til talið av starvsfólkum á ávísa stovninum ella virkinum.

Í hesum sambandi verður í grein eitt í uppskotinum staðfest, at talan er um hópuppsagnir, tá trý ella fleiri fólk verða søgd úr starvi á einum arbeiðsplássi, har millum fimm og tíggju fólk dagliga starvast.

Talan er eisini um hópuppsagnir, tá fýra ella fleiri fólk verða søgd úr starvi á einum arbeiðsplássi, har tað vanliga starvast millum tíggju og tredivu løntakarar.

Seinasta staðfestingin í hesum sambandi er, at talan er um hópuppsagnir, tá minst fimm fólk verða søgd úr starvi á arbeiðsplássum, har vanliga meira enn 30 fólk í starvi.

Verja tann veika

Hans Pauli Støm sigur í viðmerkingunum til uppskotið, at stórur partur av føroysku løntakarunum í avtalum um setanarviðurskifti hava uppsagnarfreistir úr einum upp í seks mánaðar og enntá longur enn tað. Her sipar hann til fastlønt starvsfólk og tænastumenn.

Av heasi orsøk heldir Hans Pauli Strøm ikki, at tað júst eru hesir bólkar, ið kunnu fáa mest gagna burturúr hesum lógaruppskoti, hóast vit seinastu tíðina hava fingið dømi um, at heldur ikki her virka fráboðanar- og uppsagnarreglur nóg væl í sambandi við ætlaðar hópuppsagnir.

– Tað er hinvegin tann størsti og veikasti bólkurin av løntakarum á arbeiðsmarknaðinum, sum ikki eru tryggjað við slíkum avtalum, sum hava størstan gagn av og størstan tørv á at fáa tær mannagongdir lógarfestar, sum uppskotið ásetur.

Hans Pauli Støm vísir á, at tað fyrst og fremst verða tey tímaløntu, ið fáa nakað burturúr uppskotinum.

Kostar ikki samfelagnum

Tingmaður Javnaðarflokksins vísir í uppskotinum á, at tað ikki hevur fíggjarligar avleiðingar við sær fyri samfelagið, lúka landið og kommunurnar tey krøv til mannagongdir, sum eru sett í uppskotinum.

Uppskotið fer, sambært Hans Paula Strøm, heldur ikki at hava fíggjarligar avleiðingar fyri privata arbeiðsmarknaðin, serstakliga ikki, um mannagongdirnar skjótt gerast vanlig vanlig siðvenja fyri allar partar.

Uppskotið leggur upp til, at revsað verður við bót, verða mannagongdirnar ikki fylgdar.



Hans Pauli Støm heldur, at vit eiga at tryggja teimum tímaløntu tryggari arbeiðsumstøðir

Andstøðan rýmdi úr tingsalinum

Framsøgurøðan hjá Tjóðveldisflokkinum bendi á, at aðalorðaskiftið um Caragataálitið ikki er eitt aðalorðaskifti um samgongupolitikk, men um propaganda, heldur andstøðan á tingi

JOHN JOHANNESSEN

Aðalorðaskiftið í tinginum í gjár um vinnu- og búskaparpolitikk, gjørdist heldur meira ørkymlandi enn væntað. Eftir at framsøgumaður Tjóðveldisfloksins, hevði havt orðið, kom andstøðan til ta niðurstøðu, at talan ikki var um eitt aðalorðaskifti um politikk landsstýrisins, men heldur um propaganda fyri Fólkaflokkin, og tí gjørdi øll andstøðan í felag av at rýma av tingfundinum.

Fund á loftininum

Tá framsøgumaður Tjóðveldisfloksins, Tórbjørn Jacobsen, hevði havt orðið, gjørdust andstøðulimir í iva um, hvat tað í veruleikanum var, ið varð viðgjørt, og tí valdu teir at møtast á tinghúsloftinum at tosa um, hvat tað var, ið hendi.

Á fundinum á tinghúsloftinum vóru allir tingmenn á einum máli um, at alt bendi á, at bert ein partur av samgonguni stóð aftan fyri Caragataáltitið. Og tá tað í tingskipanini krevst, at tað er landsstýrið, ið stendur aftan fyri tey mál, ið koma í tingið til aðalorðaskiftis, hildu andstøðulimirnir, at við grund í verandi støðu, var ikki grundarlag fyri viðgerðini

Tískil valdu øll framsøgufólk andstøðunnar at taka seg av røðaralistanum, rýma úr tingsalinum og heldur seta seg at lurta eftir orðaskiftinum framman fyri royndarmyndini á skýggjanum hjá SvF.

Ráðførdi seg við umsitingina

Tá andstøðutinglimirnir vóru rýmdir av tingfundinum gjørdi tingformaðurin av, at slíta tingfundin eina løtu, meðan hann ráðførdi seg við umsiting sína um málið.

Umsitingin og formansskapurin komu til ta niðurstøðu, at viðgerðin var í lagi samsvarandi tað, sum stendur í tingskipanini, um at landsstýrið skal standa aftan fyri tey mál, ið koma til aðalorðaskiftis í tinginum.

Tískil boðaði tingformaðurin løtu seinni tinginum frá, at tingfundurin bleiv niðurlagdur í døgurðasteðginum, men, at hann varð tikin upp aftur klokkan hálvgum tvey seinnapartin.

Tingformaðurin segði í hesum sambandi við útvarpið, at hann metti andstøðuna at hava handlað ímóti fólkaræðinum, men tó ætlaði hann sær ikki at bera tingfólk aftur í tingið. Tingformaðurin segði seg vóna, at andstøðan fór at møta til fundin eftir døgurða, men møtti hon ikki, fór hetta ikki at fáa avleiðingar fyri andstøðutingfólkini.

Hálvtómur tingsalur

Tingfundurin varð tikin upp aftur klokkan hálvgum tvey, sum ætlað, men andstøðan hevði ikki broytt støðu í døgurðasteðginum. Tískil varð hildið fram við viðgerðini við í einum hálvtómum tingsali, har bert umboð fyri samgonguna vóru til staðar.

Andstøðan sat framman fyri sjónvarpinum og lýddi á orðaskiftið. Hetta segði hon seg gera, tí hon virðir fólkaræðið so mikið, at hon hóast alt vil lurta eftir tí, sum gongur fyri seg í tingsalinum.

Andstøðan metti á tingfundinum í gjár, at tað ikki var grundarlag fyri aðalorðaskiftinum um Caragataálitið, og tí gjørdi hon av at rýma

SEV hevur hug á vatninum

Umboðsnevndin hjá SEV er sinnað at halda fram við vatnorkuútbyggini, men møguleikarnir fyri vindorku skulu eisini kannast

EYÐUN KLAKSTEIN

Umboðsnevndin hjá SEV er heit fyri at halda fram við vatnorkuútbyggingini í Eysturoynni, men nú skulu kanningar gerast av, hvussu nógv vindorku kervið hjá SEV kann taka ímóti.

Fríggjadagin var umboðsnevndarfundur hjá SEV, og á fundinum, sum var ein eykafundur, legði stýrið fram eina frágreiðing um vatnorkuútbyggingina í Føroyum.

Umboðsnevndin var væl nøgd við hesa frágreiðing, og hon bað stýrið um at halda fram við arbeiðnum til mai mánað, tá vanligur umboðsnevndarfundur verður. Har verður møguliga onkur avgerð tikin um framtíðarorkuna hjá SEV.

Kanna vindin

Umboðsnevndin hjá SEV hevur biðið ein kanningarbólk kanna, hvussu nógv vindorku kervið hjá SEV kann taka ímóti frá nýggjum vindmyllum. Danska felagið DEFU skal verða til hjálpar í hesum kanningum.

Vindmyllurnar, sum verða gjørdar í dag, lata allar minst 600 kilowatt, meðan tann myllan, sum stendur uppi í dag, letur 150 kilowatt.

Tað ber ikki til at seta fleiri vindmyllur upp og lata orkuna til kervið hjá SEV, tí kervið klárar ikki endaleysa orku. Tí skulu kanningar nú gerast av, hvussu nógv kervið hjá SEV kann taka ímóti, og hvar tað er best, at møguligar vindmyllur verða settar upp.

– Umboðsnevndin hevur hug at gera meira vatnorkuútbyggingar, og vindorka kann eisini koma uppá tal, heldur enn at brúka motorar, sigur Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsnevndini hjá SEV, sum var stak væl nøgdur við fundin fríggjadagin, har kjakast var um framtíðina hjá SEV.

Vinnuskattalóggávan verður endurskoða

Fíggjarmálastýrið hevur tikið stig til, saman við vinnuni og Vinnumálastýrinum, at endurskoða vinnuskattalóggávuna, so at hon verður meira eggjandi fyri vinnuna, og vinnumálaráðharrin, Finnbogi Arge, ætlar sær at stuðla Fíggjarmálastýrinum í hesum

ÓLAVUR Í BEITI

Undir aðalorðaskiftinum í gjár, tá ið frágreiðingin hjá vinnumálaráðharranum var til viðgerðar í tinginum, segði Finnbogi Arge m.a. viðvíkjandi lagaligum skattaskipanum, at farna mansaldur er skattabyrðin í framkomnum londum bara vorðin alsamt tyngri, men nú tykist, sum hon fer at lætna aftur, við tað at hugburðurin hjá politikarum og veljarum er við at broytast.

– Mong lond hava nú viðurkent vansarnar av høgum skattatrýsti. Breið tvørpolitisk undirtøka er fyri at lækka (serstakliga) vinnuskattin til at skunda undir vøkstur og fløguhug. Eisini skattatrýst styggir møguligar útlendskar íleggjarar.

Úr 49 niður í 12,5%

Og um gongdina í Føroyum, segði Finnbogi Arge, at fyrst í 90-árunum var vinnuskattaprosentið í Føroyum lækkað úr 49 niður í 22%. Tá var tað næstan 50% í Norðurlondum. Sum partur av Norðurlendska skattasamstarvinum kundu tey fata hetta stig sum at misnýta teirra skattarúm. Eftir samráðing varð føroyska vinnuskattaprosentið sett til 27%. Stutt eftir lækkaðu Norðurlond prosentið niður í nánd av tí føroyska.

– Vinnuskattaprosentið eigur fyrst at verða lækkað niður í 20% longu frá 1. januar 2000. Síðan niður í 12,5%, so skjótt tað er fíggjarliga og politiskt møguligt. Fordømi er um hetta, nú ES hevur loyvt Írlandi 12,5% frá 2005. Vanligi inntøkuskatturin átti at verðið lækkaður mið- og stigvíst. Ein góður máti er at bjóða frádrátt fyri at seta pening í føroysk partabrøv – beinleiðis ella óbeinleiðis gjøgnum felagsgrunnar. Neyv útrokning eigur at verða gjørd, hvussu stórur hesin skattalætti verður, og nær hann verður settur í gildi.

Frálandafyritøkur

– Eisini eiga vit at fara at hugsa um at seta í verk eina skattaskipan fyri frálandafyritøkur, har keyparar og seljarar eru uttan fyri Føroyar, sum kundi líkst t.d. teirri íslendsku við 5% skatti.

– Fíggjarmálastýrið hevur tikið stig til, saman við vinnuni og Vinnumálastýrinum, at endurskoða vinnuskattalóggávuna, so at hon verður meira eggjandi fyri vinnuna. Landsstýrismaðurin í vinnumálum vil stuðla Fíggjarmálastýrinum í hesum, segði Finnbogi Arge m.a. í frágreiðing síni um búskaparvøkstur.

Páskastevnan í Ítróttarhøllini á Hálsi

Eins og undanfarin ár verður skipað fyri evangeliskari stevnu um páskirnar. Síðani fyrru hevlt at 1980-unum hevur páskastevnan skiftandi verið í Havn og í Eysturoynni. Endamálið við einari slíkari stevnu er at boða gleðiboðskapin út til Føroya fólk, og har trúgvandi úr ymiskum meinigheitum kring landið hava høvi at verða við til tiltøkini og uppliva, at Jesus livir.

Til stevnuna í ár verður Eivind Frøen úr Noreg annar av høvuðstalarunum. Eivind, sum fleiri ferðir áður hevur vitjað í Føroyum, ferðast nógv mllum Skandinavia og Asia við felagsskapinum AsiaLink. Saman við honum kemur eisini Gordon Hickson úr Onglandi, sum eisini var til páskastevnuna í fjør. Hann hevur áður m.a. fyriskipað og luttikið í fleiri møtirøðum í Afrika saman við kenda týska trúboðaranum Reinhart Bonnke.

Boðskapurin um páskirnar verður boðaður út á evangeliskum møtum, bíbliutímum og á lovsongsmøtum. Ungdómurin fer eisini at skipa fyri serligum ungdómskvøldum - har ímillum eini konsert við kendum føroyskum sang- og tónleikabólkum. Fyri børnini verður eisini eitt serligt tiltak um páskirnar.

Tað er Meinigheitin í Hoyvík, ið skipar fyri stevnuni, sum verður í døgunum 20. til 24. apríl 2000 í Ítróttar- og Samkomuhøllini á Hálsi í Havn.